# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



*Viðmerking: Blaðið fór til prentingar klokkan 10:10 – áðrenn tíðindafundin hjá løgmanni*

# SIG HVAR SKÁPIÐ SKAL STANDA

Í skrivandi stund er politiska støðan framvegis ógreið. Hóast Fólkaflokkurin fyri eini viku síðani bað løgmann skriva út nýval, so hevur løgmaður framvegis ikki funnið útav, um hann hevur eina samgongu ella ikki.

Og andstøðan veit heldur ikki, hvat hon skal gera. Í fjør høvdu vit somu kreppu við Fólkaflokkinum, sum ikki vildi taka undir við fíggjarkarminum, sum landsstýrið legði fyri tingið. Ta ferðina fekk spenta støðan andstøðuna at leggja fram eitt misálitisuppskot á løgmann. Men andstøðan, sum eftir øllum at døma hevði vónað, at onkrir fólkaflokksmenn fóru at taka undir við uppskotinum, kláraði ikki ein gong sjálv at manna lið, tá misálitisuppskotið kom til viðgerðar. Sjálvur tingformaðurin, Hergeir Nielsen og Karsten Hansen úr Miðflokkinum møttu ikki til arbeiðis hendan dagin, og tí fall tað við einum braki.

Brent barn ræðist eld, og tað kann vera tað, sum eyðkennir Høgna Hoydal í løtuni, at hann ikki risikerar, at eitt misálit frá honum enn einaferð endar við eini álitisváttan til løgmann. Men løgið tykist tað, at tað ikki skal bera til at reisa eitt misálit á eina samgongu, sum í veruleikanum bara hevur 13 tingfólk av 33.

Vit kenna væl øll tey góðu argumentini um, at so nógv góð mál liggja í tinginum, sum fella burtur, men tað skerst heldur ikki burt, at vit hava eina samgongu, sum als ikki er virkisfør.

Vit hava fleiri ferðir víst á, at Fólkaflokkurin hevur so stórt vald á hinum flokkunum. Og rætt er tað, at hann klárar merkiliga væl at halda Javnaðarflokkinum, Sambandsflokkinum og eisini Tjóðveldinum skákmát. Men tað er kanska øðrum at lasta, heldur enn Fólkaflokkinum, sum uttan iva bara ger hvat hann kann fyri at halda seg til maktina, sum politikkur í grundini snýr seg um. Men tá vit velja ein stjórnarleiðara, so er kravið til hann sera einfalt: Hann skal stýra, hann skal skera ígjøgnum, hann skal taka avgerðir.



Tað er tí, at Føroya Løgmaður hevur so stórt vald, at hann bæði kann koyra og seta landsstýrisfólk, sum tað passar honum og skriva út løgtingsval, tá tað passar honum. Hetta vald skal sjálvandi brúkast við skili – men hann skal eisini vísa, at tað er hann, sum ger av, hvar skápið skal standa, hann skal ikki lata seg kasta runt í maneguni, so sum hann hevur gjørt seinastu dagarnar. Og hevur hann mist sítt parlamentariska grundarlag, so er at taka støðu út frá tí.

Traðka í karaktera, harra løgmaður, tað er tín uppgáva!

**»» Fólk troyttast av leiðarum, sum ikki taka avgerðir**

# Nýggja Testamenti til menn

*– Eru tit fresh, dreingir?*

Soleiðis spyr forkvinnan í Javnstøðunevndini teir ellivu menninar, sum hava sett sær fyri at orða Nýggja Testamenti av nýggjum – í einum málbúni, so tey ungu skilja betur tekstin.




Tað er nýggi grunnurin ungNT, sum er farin undir hesa verkætlan, og aftan fyri grunnin eru Fólkakirkjan, Katólska Kirkjan, Brøðrasamkoma, Heimamissiónin og fleiri fríkirkjur so sum Frelsunnarherurin, Keldan, Oasan og Evangeliihúsið. Hetta talar fyri breidd, má sigast. Men forkvinnan í Javnstøðunevnini vísir á, at tað bara eru menn, sum eru í hesum arbeiði. Hon vísir á, at her er ein blindur vinkul, sum er ómodernaður og og óneyðugur, tí hon heldur ongan iva vera um, at onkur kvina í onkrari samkomu onkustaðni man hava hesar førleikar.

Og rætt hevur hon, her hava menn ikki hugsað seg nóg væl um...

# Blokkar ella forvirring

Tað var Sjúrður Skaale, tingmaður fyri Tjóðveldi, sum herfyri reisti spurningin um, at tað var skilabest, at flokkar tóku seg saman í blokkar, sum framman undan einum vali boðaðu frá, at teir vildu í samgongu saman. Eins og vit kenna tað úr ørðum londum, til dømis úr Danmark.

Men hvussu skuldi ein slíkur blokkur verið í Føroyum? Onkur heldur, at Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi var ein upplagdur blokkur. Fólk á vinstraveinginum eru í Tjóðveldi, men har eru eisini borgarlig fólk. Sambandsfólk eru í Javnaðarflokkinum, og nógvir ljósareyðir borgarligir sosialdemokratar eru í Sambandsflokkinum.

Javnaðarflokkurin fekk fólkapensjónina ígjøgnum saman við Sambandsflokkinum í 1959. Hann fekk bæði Samhaldsfasta og Arbeiðsloysisskipanina saman við Fólkaflokkinum í 1991.

Nýggi formaður Javnaðarfloksins hevur proklamerað, at flokkurin er ein »samríkisflokkur«, og tá stórir sigrar hjá Javnaðarflokkinum eru háløðir heim saman við Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum, so mugu vit staðfesta, at Javnaðarflokkurin trívst væl í borgarligum selskapi – og ja, føroyskur politikkur er forvirraður.

Vit mugu nokk viðganga, at tá man brúkar mestu kreftir í meira enn hundrað ár upp á at stríðast um bondini til Danmarkar – so verður talan um eina politiskt forvirraða tjóð...



**»» Eru tit fresh dreingir**

KRISTIANNA W. POULSEN
KJAK Á SÍÐU 12



**»» Nei til brand-skatting**

KITTY MAY ELLEFSEN
KJAK Á SÍÐU 29

# Veljarin skilir ikki flokkin – ella øvugt?

– Vit hava ikki dugað at selt okkara boðskap. Hetta hevur Jóannes Eidesgaard, fyrrverandi formaður Javnaðarfloksins sagt, hvørja ferð hann er spurdur um vánaligu úrslitini, sum Javnaðarflokkurin hevur fingið í veljarakanningum.

Og rætt er tað, at flokkurin hevur ikki fingið nógv burturúr, um so er, at rikni politikkurin er tann rætti. Hinvegin hevur gingist betur hjá Sambandsflokkinum at fáa veljararnar at trúgva, at flokkurin hevur gjørt júst tað rætta.

Fólkaflokkurin klárar seg eisini illa í veljarakanningum.

– Men tað gera vit altíð, siga tey í Fólkaflokkinum. Og rætt er tað, tey hava dugað væl at fingið eitt væl betur úrslit, enn veljarakanningar hava spátt.

Men Sambandsflokkurin hevur eisini víst, at hansara veljarakanningar hava verið alt ov góðar. Tað vóru tær millum annað í 2004, tá flokkurin – í mun til bjørtu veljarakanningarnar – fekk eitt katastrofuval. Tá legði Lisbeth Petersen frá sær sum forkvinna beint eftir valið.

Vit kunnu bara gita um, hvussu støðan verður hesaferð, um val verður úrslitið av margháttliga valdsstríðnum í samgonguni. Hóast tað hevur gingið væl hjá løgmanni, sambært veljarakanningunum, so tykist Sambandsflokkurin ikki sørt forvirraður, nú Fólkaflokkurin biðjur um nýval.

Andstøðan vil eftir øllum at døma heldur ikki hava val, og tá so løgmaður ikki vil sleppa Fólkaflokkinum úr samgonguni, so kann tað enda við, at Fólkaflokkurin stendur eftir sum tann flongdi hundurin og má taka seg úr samgonguni og harvið frásiga sær alla politiska ávirkan. Tað líkist ikki Fólkaflokkinum.

At veljarin er ørkumlaður er eyðsæð. Eitt ørkymlað stýrið við einum ørkymlaðum løgmanni ger politisku støðuna komiska.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*